Fiskivinnuráðið

Fundur 2025/14

Frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum mánadagin 08. desember 2025 kl. 14.00

Møtt:
Jóanna Djurhuus, formaður.
Stefan í Skorini, Føroya Reiðarafelag
Jógvan Hansen, Føroya Ráfiskakeyparafelag
Annfinn Garðalíð, FSN/MF
Jan Højgaard, Føroya Fiskimannafelag
Sonja Jógvansdóttir, fyri feløgini hjá arbeiðsfólki á fiskavirkjum.
Finnbjørn Vang, Meginfelag Útróðrarmanna
Jóhannus Martin Olsen, Føroya Ráfiskaseljarafelag

Skrá:

0) Góðkenning av dagsskrá
1) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi.

Ad 0: Góðkend uttan viðmerking.

Ad 1: Frágreiðing til Løgtingið 4. hvørt ár. Vísa til alivinnuna.

Taka undir við broytingunum. Viðv. landing uttanlands – 4 vikur í senn.

Føroyabanki: Taka undir við broytingunum. FVR er tó ivasamt, um tað er rætt at fara frá kunngerð til fráboðan. Bert broytingar í kvotum og døgum kunnu fremjast umvegis fráboðan. Hav bankan opnan, tá tíðin er tann rætta – okt. – mars.

§ 26. FVR er í iva, hvørjar avtalur í § 26, stk. 3 koma undir hesa ásetingina. Er bert talan um avtalur í t.d. NEAFC, NAFO og øðrum ? Biðja um frágreiðing. Talan er um eina ógvuliga víðfevnda heimild, sum má brúkast við størsta varsemi, og avleiðingar av at brúka heimildina mugu viðgerast neyvt.

§ 31a. FVR tekur undir við hesum. Hetta er ein bati.

§ 34. FVR hevur onga viðmerking. Tvmr má hava heimild at taka støðu í serligum førum.

§ 37, stk. 1. FVR hevur onga viðmerking.

§ 41. FVR er ivasamt til hesa broytingina. Umboðini skriva og senda inn egnar viðmerkingar.

§ 52 a. FVR hevur onga viðmerking.

Fundur lokin kl. 15.30.

Jóanna Djurhuus

Símun Grønadal

Fylgiskjal 3

Umboðið hjá Føroya Fiskimannafelag hevur hesa viðmerkingar.

Víst verður til punkt 10, § 41, stk. 3. Tá hugsað verður um tær rættiliga stóru upphæddir, sum vit hava mist, tí svartkjaftaskip hava ligið í bíðirøð, eiga vit at seta 30 dagar inn.

Víst verður til punkt 1 og 2, § 22. Vit eiga at fiska á Føroyabanka, tá fiskurin er best fyri, so vit fáa sum mest fyri hann. Tí eiga vit at fiska á Bankanum frá ½ sept. til 1 apríl.

Katrina Michelsen

Fra:	Símun Grønadal
Sendt:	27. april 2026 12:52
Til:	Katrina Michelsen
Cc:	Jenny Vilhelm; Joanna Djurhuus
Emne:	Fundur 12 Fiskivinnuráðið 2026.

Fiskivinnuráðið hevur havt uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi til viðgerðar. Fiskivinnuráðið hevur fingið hesar viðmerkingar:

Frá Føroya Reiðarafelag:

"Føroya Reiðarafelag hevur fingið lógaruppskot um at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og rættindum til hoyring. Gildistíðin verður longd upp í 10 ár, ið tó krevur, at loyvini verða longd á hvørjum ári eftir hetta. Reiðarafelagið tekur undir við, at gildistíðin verður longd upp í 10 ár.

Tó verður í fyrsta lagið skotið upp, at gildistíðin verður longd upp í 12 ár, eins og lógin frá 2019 ásetti. Í øðrum lagi verður skotið upp, at gildistíðarskeiðið ístaðin hevur eina uppsagnartíð, har løgtingið síðani kann siga loyvini upp. Hetta var skipanin í lóg um vinnuligan fiskiskap frá 1994. Hetta hevði givið føroyskum reiðaríum størri tryggleika fyri sínum virksemi og íløgum.

Reiðarafelagið heitir eisini á landsstýrismannin um at leggja uppskot fyri løgtingið á hvørjum ári um at leingja gildistíðina undir verandi skipan."

Frá Ludvík við Stein, vegna felagið Lemmatrolarar.

"Rætturin, at veiða svartkalva í Bretskum sjógvi, er ein serrættur hjá Bólki 2. Serliga eru tað lemmatrolarar, ið gagnnýta henda rætt.

Soleiðis, sum eg lesi broytingarnar, so kunnu øll skip nú royna eftir hesum svartkalva í bretskum sjógvi, eftir at broytingarnar verða framdar.

Tað er væl skilligt, at full gangnýtsla av kvotu altíð eigur at verða málið. Men betur var, um man setti tíðaravmarking á, til aðrar skipabólkar, at fiska ta kvotu, ið møgulia var eftir móti ársenda. Hetta kundi verið í novebmer-desember.

Soleiðis, fekk skipabólkurin, Bólkur 2, famhaldandi fullan rætt at veiða henda fisk í brestskum sjógvi."

Aðrar viðmerkingar eru ikki komnar til uppskotið.

Blíðar heilsanir / Kind regards

Símun Grønadal
Fulltrúi

Telefon / Mobile: +298 22 22 58
Simun.Gronadal@tvmr.fo